Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR

# Trillrund av handlum í Kvadraten



Handlar av alskyns slagi eru í »Kvadrat«. Í framtíðini verður eisini møguleiki at vitja eitt mat-tempul og eitt skate-sentur




Sølumiðstøðin »Kvadrat« er stór, men ikki nóg stór. Nú ætla eigararnir at víðka um tilboðið, soleiðis at tey vitjandi skulu hava 220 handlar at velja ímillum í 2020

**Hóast 150 handlar eru í stóra handilsdeplinum »Kvadrat« sunnanfyri Stavanger, so er hetta ikki nóg mikið hjá eigarunum. Ætlanin er at økja talið við eini 70 handlum, soleiðis at samlaða talið fer at liggja millum 200 og 220 í 2020.**

– Sølumiðstøð okkara skal ikki neyðturviliga vera tann størsta í landinum. Men vit ynskja at hon skal tann besta.

- Tí er neyðugt at hon endurnýggjar seg og gerst munandi størri, siga Cato Helmersen og Olav Line í fyritøkuni Steen & Strøm, sum er størsta sølumiðstøðarketan í Norðurlondum.

Henda fyritøkan rekur stóru sølumiðstøðina »Kvadrat« beint sunnanfyri Stavanger, og hevur sett sær sum mál at gera hana enn størri tey komandi 10 árini.

Víðkanin verður framd allar vegir, soleiðis at pláss verður fyri 70 handlum aftrat, einum mat-templi og einum surfi- og skatesentri. Ætlanin er somuleiðis at byggja eitt stórt hotell til ráðstevnur á økinum.

- Endamálið er at gera »Kvadrat« til meiri enn eina handilsmaskinu. Tað skal gerast ein upplivingardepil, sigur Olav Line.

### 10 mió vitjandi

Upprunaliga var bygningurin, har »Kvadrat« heldur til als ikki ætlaður sum sølumiðstøð. Ætlanin var at byggja bæði eitt jarnstoyparí og eitt privat sjúkrahús.

Hesar ætlanir gjørdust ikki veruleiki, og í dag er Kvadrat ein sølumiðstøð við fleiri milliónum vitjandi um árið. Við nýggju útbyggingini verður miðað eftir at hækka talið av vitjandi úr 6 upp í 10 mió um 12 ár!

Hetta skal alt gerast í samsvar við málini í eini strategiskari vinnuætlan fyri økið, har matur og orka skulu setast í hásætið.

Ætlanin er tí at leggja dent á, at Kvadrat skal gerast eitt marknaðarpláss fyri smærri handlar, sum selja rávørur úr økinum men eisini frá útheimi.

- Vit lesa so nógv um, hvussu fólk satsa uppá mat og matgerð. Men so løgið tað ljóðar, er einki stað har fólk kunnu síggja, hvat tað er fyri nakað. Hetta vilja vit gera nakað við, sigur Cato Helmersen.

Samstundis við hesa útbyggingina skal »Kvadrat« gerast heimsins fyrsta CO2-neutrala sølumiðstøðin: Orkuna skula tey sjálvi framleiða úr sól, vindi og bioorku, meðan restin verður keypt aðrastaðni.

Íalt fer kostnaðurin av hesi stóru útbyggingini at liggja millum 1 og 2 milliardir krónur, tá hotellið ikki er íroknað.

## Puntur nr. 20



